betri trygging

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
FO 100 Tórshavn
Tlf. 358700
umhvorvi@umhvorvi.fo

Tórshavn, tann 30. mai 2023
JH/

Hoyringssvar viðv. uppskot til løgtingslóg um broyting í Arbeiðsskaðatryggingarlógini

Víst verður til teldupost tykkara 2. mai 2023 og viðheftu skjøl viðv. ætlaðu broytingunum í arbeiðsskaðalógini.

Tað er gleðiligt, at stig eru tikin til at javnseta framhaldandi endurgjaldsveitingar við aðrar endurgjaldsveitingar sbrt. løgtingslógini, men sum heild meta vit, at arbeiðsskaðalógin átti at verið gjøgnumgingin og dagførd øll sum hon er, soleiðis at hon samsvarar mest møguligt við ta donsku lógina og fylgir teimum broytingum, ið har hava verið gjørdar gjøgnum árini, sum liður í samfelagsmenningini.

Serliga meta vit, at millum annað ein broyting svarandi til § 17a í donsku arbeiðsskaðalógini viðv. áseting av mistum vinnuføri grundað á inntøku í mun til inntøku áðrenn arbeiðsskaða og ávikavist arbeiðssloysisveiting og inntøku í fleksjob, hevði verið viðkomandi í føroysku lógini.

Sum er, verður ikki mótoknað í almannaveitingum í mun til veiting av mistum vinnuføri. Hetta er sera óheppið, tí tann skaddi tá fær væl størri samsýning enn hann í veruleikanum missir, og tí beint í ansøgn við tey arbeiðsfremjandi átøk, ið skulu viðvirka til og stimbra/eggja skadda, at koma út aftur á arbeiðsmarknaðin eftir ein arbeiðsskaða.

Eisini verður mett, at tað í størri mun er tørvur á ásetingum um freistir fyri, nær avgerð skal verða tikin, samsvarandi § 16 í donsku lógini, tí í nógvum førum koyrir leypandi veiting longri enn neyðugt, áðrenn endalig avgerð verður tikin. Hetta ger, at skaddi kemur longur og longur burtur frá arbeiðslívinum og harvið hevur verri við, at fóta sær aftur í arbeiðslívinum.

Viðmerking til orðingar
Víst verður til javntekstin til § 66, har tað stendur í síðsta petti: *"...Sama er galdandi, um viðkomandi, ið hevur rætt til veitingina, longu hevði rætt til fólkapensjón, tá..."*

Spurningurin er, hvat liggur í "rætt til fólkapensjón" ella um talan bert er um eina tilvildarliga orðing.

Sagt verður frá, at hetta uppskotið fer at hava við sær, at tørvur verður á at hækka tryggingargjøldini.

Vinarliga

Betri Trygging P/F